gult2 cyan2 magenta2 svart2

Postverkið er politiskt punkterað

Sambært landsstýrismanninum við ábyrgdini fyri Postverkinum, er líkt til, at ætlanin um at dagføra Postverkið er punkterað av Tjóðveldisflokkinum

POSTVERKIÐ
John Johannessen

Politiskt skuggaspæl frá Tjóðveldisflokkinum er sambært landsstýrismanninum í vinnumálum, Bjarna Djurholm, allarhelst orsøkin til, at Postverkið ikki verður dagført.

– Í november í fjør var Vinnumálastýrið nærum komið á mál við eini ætlan um, hvussu Postverkið skuldi dagførast. Men av ávísum orsøkum, ið eg haldi vera politiskar, datt ætlanin niðurfyri, sigur Bjarni Djurholm.

Sambært landsstýrismanninum við ábyrgdini fyri Postverkinum, er politiskt skuggaspæl og avtalubrot frá Tjóðveldisflokkinum orsøkin til, at vit framhaldandi hava eitt postverk við ongum tænastustøði

Næstan á mál

Sosialurin skilir, at Bjarni Djurholm sipar til nakrar fundir millum Vinnumálastýrið og limirnar í Postfelagnum um eina skiftisskipan fyri starvsfólkini innan Postverkið, ið skuldi koma í gildi, tá stovnurin varð dagførdur.

Á hesum fundum vóru Postfelagið og Vinnumálastýrið komin ásamt um, at Postfelagið skuldi taka undir við eini dagføring, um limirnir afturfyri fingu eina fyritíðarpensjón, eftirútbúgving í skiftistíðarskeiðnum lutvíst við løn, møguleika fyri starvi í øðrum almennum stovni og persónliga førleikan skrivliga staðfestan.

Men, sum vit skilja á landsstýrismanninum í Vinnumálum var eftir øllum at døma nógv samskifti millum Postfelagið og Tjóðveldisflokkin, meðan hesar samráðingar fóru fram. Og var hetta samskiftið beinleiðis orsøkin til, at einki spurdist burturúr.

– Vit vóru til reiðar at nýta tíggju milliónir krónur til skiftisskipanina. Men av einari ella aðrari politiskari orsøk, fór alt í vaskið, harmast Bjarni Djurholm.

10 mió til Tórbjørn og Helenu

Hetta gjørdi, at Bjarni Djurholm legði málið um Postverkið fyri aftur landsstýrisfund. Har fekk hann grønt ljós fyri at gera eitt lógaruppskot, um at Postverkið millum annað skuldi skipast um til partafelag.

Afturfyri skuldu tær tíggju milliónirnar til skiftisskipan í komandi fíggjarlóg fara til Mentamálastýrið hjá Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismanni, og Almanna- og Heilsumálastýrið hjá táverandi landsstýriskvinnuni, Helenu Dam á Neystabø. Fingu tey milliónirnar, slapp Bjarni Djurholm at gera næstan, sum hann vildi við Postverkinum, var semjan í Tinganesi.

Súltað av Tjóðveldisflokkinum

Bjarni Djurholm legði tí í januar uppskot fyri tingið um framtíðina hjá Postverkinum. Men fyri góðum tveimum vikum síðani var tingsetan av, og uppskotið hjá Bjarna Djurholm kom aldri longur enn til fyrstu viðgerð.

Uppskotið varð eftir fyrstu viðgerð 1. februar 2001 beint í Vinnunevndina. Og síðani er ikki meira hent.

– Hetta gevur mær orsøk til at halda, at semjan er politiskt spolerað. Uppskotið er súltað í Vinnunevndini, har Heini O. Heinesen, formaður í tingbólki Tjóðveldisfloksins millum annað situr, sigur Bjarni Djurholm.

Einki kappingarføri

Avleiðingarnar av øllum hesum heldur Bjarni Djurholm vera sera óhepnar. Tí eftir hansara tykki er tað nú greitt, at vit framhaldandi fáa eitt Postverk, ið als ikki er kappingarført, og sum hevur eitt lágt tænastustøði.

– Postverksstjórin má nú leggja fíggjarætlanina soleiðis til rættis, at alt hongur saman. Og tað fer at merkja uppsagnir og vánaligt tænastustøði, ger Bjarni Djurholm greitt.

Sáttmáli við blaðmannafelagið

TÍÐINDASKRIV
Blaðútgevarafelag Føroya

Í nátt varð semja gjørd í sáttmálasamráðingunum millum Føroya Blaðútgevarafelag og Føroya Blaðmannafelag.

Semjan merkir eina hækking í lønini pr. 1. mai 2001 upp á 4,5%, umframt eina hækking av eftirlønini upp á 2% og pr. 1. mai 2002 eina hækking í lønini upp á 4,5% og í eftirlønini upp á 2%; tilsamans 13% nom. í eitt tvey ára sáttmálaskeid.

Hóast blaðútgevarafelagið undir samráðingunum hevur gjørt vart við, at eitt ov høgt samráðingarúrslit í mun til tær semjur, ið eru gjørdar higartil, fer at fáa avleiðingar á redaktiónunum vegna fíggjarligu støðuna hjá bløðunum, hava blaðmenninir tvíhildið um at fáa eina hækking av reallønini.

Blaðútgevarafelagið hevur valt at innganga semju, og fara Dimmalætting og Sosialurin nú at fyrireika og fremja umstruktureringar og rationaliseringar á redaktiónum sínum.

Fíggingin í lagi

Nýggir partaeigarar hava sett 120 milliónir krónur av nýggjum partapeningi í P/F Smyril Line

Hækkaði partapeningurin merkir, at Smyril Line fer at halda fram við virksemi sínum sum higartil, og at nýggja Norrøna verður latin felagnum seinast í mars mánaða 2003.

Hækkingin av partapeninginum hevur gjørt, at øll viðurskifti við týsku skipasmiðjuna, sum smíðar nýggja skipið, eru komin upp á pláss.

Nýggj fýramanna nevnd, sum umboðar nýggju partaeigararnar í Smyril Line, verður vald á eykaaðalfundi, sum fer at verða hildin um einar 14 dagar.

ej